## DAGSINS MEINING

### Áhugavert men vandafult hugskot

Mong mun du gerast bilsin, tá formaður Havnar Arbeiðsmannafelags í Degi og Viku mánakvøldið luftaði hugskotinum um 3 parta samráðingar millum partarnar á privata arbeiðsmarknaðinum. Tað, sum helst elvir til størstu undran, er timingin og so sjálvt hugskotið. Mong mundu mánakvøldið spyrja, hví formaðurin kom við hugskotinum júst nú, hvar tað kann skapa eitt sindur av iva um samanhaldið millum feløgini í verkfalli. Tað er tó einki, ið bendir á, at hugskotið um 3 partasamráðingar er ætlað at skapa iva um støðufestið og stríðsviljan. Heldur kundi nakað bent á, at talan bert er um, at tann fastlæsta støðan fær formannin at umhugsa alternativar samráðingarformar í framtíðini, og um tann beiska veruleika, at tað er sera torført at tryggja ein haldgóðan reallønarvøkstur, uttan mun til samráðingarúrslit.

So er tað sjálvt hugskotið um at tengja samráðingar um skatta- og avgjaldslættar upp í sjálvar sátt-málasamráðingar og at hava fíggjarmálaráðið við í samráðingunum. Her skuldu so fakfeløgini, fíggjarmálaráðharrin og arbeiðsgevararnir sitið við eitt og sama samráðingarborð. Uppskotið er óvanligt, og áhugavert men ikki vandaleyst. Tað er ikki óvanligt, at serliga ein borgarlig stjórn roynir at tryggja afturhald við lønarkrøvum við at lova skattalættar í sambandi við lønarsamráðingar. Men tað er heilt óvanligt um okkara leiðir at fíggjarmálaráðið situr við samráðingarborðið saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Fíggjarmálaráðharrin vil altíð hava ein gegnistrupulleika, alt eftir hvørja ideologiska áskoðan, hann hevur. Tí er hugskotið eitt sindur ivasamt sæð frá einum demokratiskum sjónarmiðið.

Hugskotið um 3 partasamráðingar er ikki vandaleyst, tí vit vita av royndum, at skattalættar sjáldan kunnu setast í staðin fyri lønarhækkingar. Tað vísir seg altíð, at sum frá líður, eru tað tey lágløntu, sum tapa, tí skattahækkingar koma fyrr ella seinni aftur og eta upp tann reallønarvøkstur, sum ein vann við skattalættanum. Hetta tí útreiðslustøðið støðugt hækkar innan almenna sektorin, serstakliga til skúla og almannamál. Steðgar ein hesum vøkstri verða tey lágløntu tapararnir. Tískil er besta trygdin fyri eini reallønarhækking, at ein sámuligur lønarvøkstur verður tengdur at t.d. avtøku av matvøru-MVG og av oljugjaldinum. Onnur stig, sum tað almenna kundi ttikið, var at at fingið skil á íbúðarøkið, so ung og láglønt hava ein møguleika at seta búgv. Um 3 partasamráðingar eru rætta leiðin við hesum baksýni er ivasamt, tí her er talan um viðurskifti, ið eiga at vera fingin upp á pláss, áðrenn sáttmálasamráðingar byrja.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Latið verða við at billa tykkum inn at tykkara limir eru pillbýttir

**Niels Uni Dam**
*ba í samskifti og heimsspeki*



Eg eri um at sprongjast av øði, tá eg síggi Ingeborg Vinther og Hans Joensen føra seg fram.

Harra Guð, Ingeborg átti man næstan at hava vænt seg við. Hvørja ferð hon er innblanda, skal verkfall lýsast. Helst nóg leingi til at allir fjølmiðlar hava víst hennara snýð væl og virðiliga. Eg kenni væl hesa sjúkuna, fjølmiðlagreði eitur hon. Eg líði sjálvur av henni. Stutt sagt, elskar man at síggja seg sjálvan í bløðum, hoyra seg í útvarpi, ella best av øllum, hoyra og síggja seg í sjónvarpi. Hetta gevur eitt sokallað rush, ein kensla sum er nokkso deilig.

Eg útlivi hesa greði, við at fara á pallin og rappa, og við at skræða meg um tað, sum eg havi á hjarta. Men Ingeborg hevur ein nógv meiri oyðileggjandi máta at útliva hesa greði. Hon leggur alt landið lamið, og skaðar samfelagsbúskapin ómetaliga nógv. Fyri hennara rush fær samfelagið sár, sum í síðsta enda raka tey veikastu í samfelagnum.

Nú eru tað kanska nøkur heilt fá har úti, sum hava latið seg lumpa av hesari skjótttosandi og nokkso freku madammuni, sum sigur seg arbeiða fyri verkamannin. Trúgv mær, hetta er ikki so. Um hon veruliga arbeiddi fyri verkamannin, so hevði hon ikki altíð lagt út við verkfalli, og krøvum, sum sjálvt hon má fata koyra landið á heysin. Hon hevði eisini hugsa um samfelagsligu fylgirnar av hesum verkføllum og tí avlagaða búskapi, sum hennara lønarkrøv hava við sær. Krøvini er vanvittig, og beinleiðis avleiðingarnar vera, at fólk verða søgd úr starvi fyri at fíggja lønarhækkanina. Síðan fara prísirnir á øllum tænastum og vørum upp.

Hetta verkfalli snýr seg um at nakrir fakfelagsbossar skulu føla seg týdningarmiklar og sleppa í fjølmiðlarnar. Einasta orsøk, til at bossarnar ikki ynskja at limirnir skulu atkvøða um semingsuppskotið, er at tey eru so smátt farin at ivast í, um liminir munnu vera so pillbýttir, sum tey hava bilt sær sjálvum inn.

Lat meg tryggja tykkum øllum, teir av tykkara limum, sum eg havi tosa við, eru ikki býttir. Teir vita líka væl sum restin av okkum, at tit ikki hugsa um teir, men um tykkum.

Hví Hans Joensen er lopin við í verkfallsbátin, er heldur ikki so ringt at skilja, maðurin bleiv valdur við einum nokkso teprum meiriluta, á einum ófantaligum og næstan hatskum fundi. Hann hevur brúk fyri at markera seg. Hann sær hvussu væl tað gongur hjá Ingeborg, hon sleppur í allar fjølmiðlar og vil tí sjálvandi eisini sleppa upp í part.

Vónandi hava liminir í verkamannafeløgunum gott minnið, og geva hesum fjølmiðla- og maktgræðu leiðarum durðafjórðingin næstu ferð væl er, tí Føroyar er eitt ov lítið land til at yvirliva slíkt landsfíggindaligt virksemið fleri ferð afturat.

# Uppskot til loysn á fastløstu støðuni á arbeiðsmarkaðinum

**Dánial á Dul Jacobsen**



Tað verður ført fram av fakfelagsleiðarunum í verkfalli, at nú má gjógvin millum arbeiðarafeløgini og øll hin fakfeløgini gerast minni. Hetta er væl skiljandi, men hetta fáa arbeiðsgevararnir tíverri einki gjørt við. Satt at siga so gera teir bert støðuna verri, um teir ganga krøvum verkafólkanna á møti. Lat okkum siga, at teir heilumvenda seg og bjóða feløgunum 10 kr. meiri um tíman í 2 ár - tilsamans 20 kr. meir um tíman. So fara øll hini feløgini, sum sótu so fitt á fundi og lovaðu arbeiðarafeløgunum fullan stuðul, at krevja prosentvísa sama part í sínum samráðingum og kanska fara í verkfall um tey ikki fáa tað. Tað vil siga, at jú fleiri lønarkrónur arbeiðsfeløgini fáa tess hægri prosentpart krevja hini feløgini og ja, rætt roknað, gjógvin millum feløgini gerst uppaftur størri.

Tey einastu, sum kunnu hjálpa arbeiðarfeløgunum við veruliga trupulleikanum, eru hini feløgini. Tí skjóti eg upp, at øll hini fakfeløgini vísa veruligan solidaritet mótvegis arbeiðarfeløgunum og gera av at leingja allar sínar sáttmálar óbroyttar í 2 ár samstundis sum arbeiðarafeløgini fáa tað sum svarar til annað av semingsuppskotunum. Soleiðis fæst gjógvin at minka og helst bara so. Av tí, at eg sjálvur eri starvsmaður, skjóti eg upp, at mítt egna felag, Starvsmannafelagið, gongur undan og kallar øll feløgini saman at umrøða uppskotið.

Næsta stigið má so vera at fáa, sum Hans Joensen tosar um, politikkararnar at fremja tiltøk, sum veruliga hækka reallønina hjá okkum øllum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Quo vadis Føroya fólk ?

**Verður lagna Føroya fólks avgjørd av loysingarhugaðum intellektuellum kommunistiskt reflekterandi chefideologum og citatpapageykum ella av pragmatiskum SMS-blað lesarum?**

**Regin Eikhólm**



Fyri umleið fimm árum síðani fingu vit eitt loysingarlandsstýri, við loysingarflokkinum sum tann veruligi maktfaktorurin, takkað veri tendentiøsari og anti danskari loysingarútlegging av okkara búskaparligu trupulleikum í 80-árunum. Rabiata loysingarhugsjónin var tá sum nú eitt fjølmiðlafyribrigdi um eina politiska fiktión, ið byggir á ein foreldaðan nalvaskoðandi nationalromantik og eitt ólogiskt og erkvisið danakomplex, umboðandi tey sokallaðu frælsislyftini hjá teimum "intellektuellu" kommunistiskt reflekterandi chefideologunum og teirra citatpapageykum.

At talan var um eina fiktiónin, kom longu til sjóndar tá sjálvútnevndi loysingarmálaráðharrin við síni selektivu hvítubók møtti politiska veruleikanum, og bæði svunnu sum døgg fyri sól. Síðani tá hevur ongin sæð ella spurt eftir teimum. Lagnan er mest tann sama hjá landsstýrisfólkunum fyri loysingarflokkin. Tey eru fremmandagjørd fyri vanligari demokratiskari siðvenju og vera tessvegna skift úr sessinum, so hvørt tey møta politiska veruleikanum. Aktuelt stendur ein teirra ákærdur fyri so álvarsligar hóttanir móti sínum egnu, at sjálvur løgmaður er skrivliga biðin um at vera verji, og "Skarpur verður hildarleikur, tá Norðmenn mót norskum stríða", kvøður Sjóvarbóndin!

**Vejrgudernes og strejkernes tumleplads**

William Heinesen segði, at Fæeøerne er vejrgudernes tumleplads, men samanborið við onnur europæisk lond so eru vit eisini "strejkernes tumleplads" nummar eitt, langt langt frammanfyri øll hini londini (Útvarp Føroya, Sostatt, 14/5-03). Henda ivasama heiður kunnu vit í stóran mun takka loysingarflokkinum fyri, sum við teirra loysingarævintýri hava fyrigyglað fólki, at trøðini fóru at vaksa inn í himmalin, um danir fingu fótin og teir sluppu framat. Atferðin hjá samgongu politikarunum hevur eisini í fyrstu atløgu styrkt Palleba í trúnni um at so er.

Tí hóast fýra milliarda skuldina, minkaðan blokk og uttan at hava funnið olju so hildu politikararnir seg ikki aftur. Umframt at geva sær sjálvum stórstu lønarhækkan í mans minni, so nørdu teir uttan fyrilit um almennu fyrisitingina og gingu har á odda við at geva høga løn, stutta arbeiðstíð, langa feriu og frynsaágóðar annars, nakað sum vinnulívið als ikki kann kappast við.

Stuðulsfría vinnulívið má svara hvørjum sítt, og kann ikki trekkja uppá almennu skattakrónurnar, og senda rokningina víðari til Palliba, eins og tað almenna ger.

Tað kann tí valla undra nakran, at ábyrgdarar fyri arbeiðarafjøldina kring landið nú eisini vilja hava teirra bita av køkuni. Trupulleikin er bert tann, at almenna fyrisitingin longu hevur etið næstan alla køkuna upp, og sambært búskaparfrøðinginum, Magna Laksáfoss, noyðist sitandi loysingarlandsstýrið longu um tvey ár at taka lán fyri at svara hvørjum sítt. (Sosialurin 16/5-03). Hetta er óhoyrt nú beint eftir fleiri ár við rokfiskiskapi, høgum prísum, arbeiði til allar hendur og framhaldandi 600 mill krónur í blokkstuðli árliga.

**The Land of Maybe**

Enski herðmaðurin, Sydney Norgate, hevði helst meiri rætt enn hann gáaði um, tá hansara bóklingur um Føroyar: "KANSKA or The Land of Maybe" kom út í 1943 (HNJ). Hjá honum var tað serliga grundað á veðrið, men í fimm ár við rabiatu loysingarhugsjónini, eru Føroyar rættiliga komnar í fokus sum "The Land of Maybe", við afturvendandi drúgvum aðalverkføllum v.m.

Henda vanstýringin av landinum er drepandi fyri vinnulívið bæði á sjógvi og landi, eins og tað er fyri álitið á Føroyar sum heild, ikki minst sum ferðamannaland. Samanumtikið er hetta helst stórsta hóttanin móti okkara vælferð, tí vælferð byggir á trygg og rúmsátt búskaparviðurskifti og ikki á "prøv lykken" loysingarromantik við hartilhoyrandi ótryggleika.

At langt er millum teori og praksis, sóu vit, tá sitandi loysingarsamgonga fíggjarliga valdi at spenna bein fyri flaggskip okkara, Norrønu, tá hon sum hotelskip skuldi servicera í sambandi við altjóða fiskivinnustevnuna í Runavík. Í tí sambandi søkti Norrøna um skonkiloyvi, sum um okkara leiðir er ein sjálvgivin og neyðugur partur av altjóða hotelrakstri. Skonkiloyvið varð noktað teimum, grundað misskilt religiøst erkvisni og maktgirnd í loysingarsamgonguni. Vorðið sum frælsishugsjón við sjálvbjargni sum stavnamerki!

**Blokkurin út og hvat so**

Tey yngru vælútbúnu, sum søkja sær samleika í loysingarflokkinum, og kundu hugsast at havt potentiali til at stuðla undir eina endurnýggjan og fjøltáttan av vinnulivinum, eru mest ikki at finna í privata vinnulívinum. Tey halda seg til tann almenna sektorin, har blokkstuðulin enn ger teirra mánaðarligu lønarflyting váðaleysa, í mun til hvat eitt váðafýsi vinnulív kann bjóða teimum. Hetta er í sjálvum sær eitt paradox, tí júst okkara stuðulsfría vinnulív stendur fyri nýhugsan við frælsishugsjónum, áræði og sjálvbjargni í fremstu røð. Tað er tí trupult at taka teirra rabiata loysingartos um fjøltáttan av vinnulívinum fyri annað enn fjákalótir, tí sambært nýggju útflutningshagtølunum eru vit í dag meira tengd at fiski enn nakrantíð (98%).

Nýggjar alternativar vinnur krevja nevniliga váðafúsan kapital, sum vit ikki hava, og tí var tað sera óumhugsið - í nationalromantiskum rúsi - árliga at senda 366 mill. krónur aftur til Danmarkar, uttan fyrst at menna okkara vinnulív og betra okkara kappingarevni, fyri síðani at hyggja eftir blokkinum og minkað/lagað hann eftir tørvi. Men longu eftir fyrsta niðurskurð av blokkinum fekk loysingarsamgongan kaldar føtur, og fór í skundi til Danmarkar fyri at fáa fastfryst restina av blokkinum valskeiðið út - just in case!!!

Tað eru enn ongi tekin í sól og mánað um, at reyðu chefideologarnir megna at byggja nakað land, heldur enn fordums reyðu friðargongurnar niðan í Mjørkadal gjørdu tað. Hetta seinasta hevur sjálvt skemtarin Esmar Eysturoy nú eisini funnið útav - umenn ein mansaldur ov seint (Fregnir nr.14, 2003).

**Politikara ómegn í búskaparfrøði**

Búskaparfrøðingurin og stjórin á Hagstovu Føroya sáðar í einum fyrilestri iva um búskaparførleikan hjá føroyskum politikarum. Í teirra búskaparfrøðis ómegn vilja politikarar til ein og hvørja tíð brúka hvørt alment oyra, sum teir ráða yvir, og tí skal blokkstuðulin burtur, so vit ikki aftur koma okkum út í búskaparligt óføri, sigur hann.

Nú var tað helst ikki av tilvild, at fyrilesturin varð hildin júst fyri loysingarflokkinum og kanska eisini sum eitt vælmeint hint um, at politiskar fiktiónir gera minni skaða í fjølmiðlaregi enn í landsstýrisregi. Tí hvussu kunnu vit umsita eina møguliga oljuvinnu, um vit ikki klára at umsita ein neyðars blokk uppá 600 mill. krónur uttan at misbrúka hann?

**Føroyskar - danskar relatiónir**

Í føroyskum / donskum relatiónum er tendensurin, at føroyskt verður umtalaðað positivt og danskt negativt. Hetta er ikki minst galdandi í okkara almennu fjølmiðlum, og serliga eftir at tann sokallaða loysingarprocessin fór í gongd.

Í Føroyum er gamalt at tosa um, at kenna hitan frá hondum sum sleptu, men nær hevur nakar hoyrt hetta nevnt, tá grýtuklárar yvirtøkur ella gávu-substitutiónir frá Danmark skifta hendur? Handan yvirtøkurnar liggur aloftast danskt fíggjaður búskaparligur sum mentanarligur førleiki.

Samanbera vit okkum við onnur smá oyggjalond - eitt nú grannan Hetland - har eingilsmenn ráða, so eru vit sloppin sera væl við framhaldandi at hava okkara egna mál og mentan umframt hópin rúmsáttari livikor og valmøguleikar enn teir, takkað veri ríkisfelagskapinum við Danmark. Reelt kunnu vit yvirtaka/loysa og føroyskra alt tað, sum føroyski fólkaviljin ynskir. Eitt minstakrav átti tí at verið, at vit fyrihildu okkum objektivt í føroyskum / donskum samskifti, sjálvt um objektivitetur enn er eitt fremmandaorð í føroyskum. Serliga okkara ungdómur hevur krav uppá reelt innlit og ikki tendentiøsa útlegging í hesum sambandi.

Annars tykist tað, sum um ein mentanarsamanrenning er á veg millum danskt og føroyskt, endurspeglað í tí setanarpolitikki sum bæði Listasavn Føroya og Føroya Fornminnisavn standa fyri. Her verður føroyskur førleiki latin á danskar hendur at umsita, enntá á økjum sum hava sera stóran týdning fyri okkara samleika sum fólk, bæði í søgu, nútíð og framtíð.

Um loysingarflokkurin hevur skotið seg sjálvan í beinið, ella um hetta er ein trend, sum vit koma at síggja meiri til, er ilt at siga, men hetta brýtur við verandi nationalromantisku isolationismuna, sum annars hevur verið tað berandi í populistiska loysingarpolitikkinum.

**Quo vadis Føroya fólk**

Svarið uppá spurningurin, quo vadis Føroya fólk - hvagar gongur tú - er avgerandi fyri okkara lagnu sum fólk.Verandi ultimativi meirlutin í loysingarsamgonguni fær sítt svar úr erva eins og spurningurin, quo vadis, í forum eisini fekk sítt svar úr erva. Tað kann virka eitt sindur ørkymlandi uppá vanliga nútíðarmenniskja, at samgongan bókstaviliga stendur til trúgvandi bæði so og so.

Sambært skemtaranum í Fregnir so vísir ein kanning, at munur er á fólki og hvørja politiska leið tey ynskja at ganga. Tann rabiati loysingarpolitikkurin fær undirtøku frá teimum sokallaðu intellektuellu, meðan hini, sum ikki taka undir við hesum, hoyra mest til tey pragmatisku sum lesa SMS-blaðið. Annars vísir ein gallupkanning hjá Útvarpi Føroya, at samgongan hevði mist sín meirlut, um val var nú.

Kanska er tað við at ganga upp fyri Føroya fólki, at eitt virðiligt lívsfrælsi fyri øll her í Føroyum verður ikki tryggja við populistiskum loysingarmodellum og religiøsum erkvisni í lyklastøðu, men við realpolitikki og búskaparligum atliti.

Globaliseringin ger, at alt fleiri lond fara uppí ES, ið eisini er okkara stórsti marknaður. Sjálvt okkara smáu kommunur síggja nú eisini fyrimun ella tað neyðuga í størri eindum. Vit eiga tí sum tjóð, eisini at tora at síggja veruleikan í eyguni og ikki nationalromantiskt fara fram eftir fummum sum higartil.

# 62,9 km uppá 20 min. gav 16.151 kr



Piltarnir hjá HB savna pening saman til eina Danmarkarferð. Teir skulu vera við í eini fótbóltskapping, sum verður í Lemvig í døgunum 15.-21. juli.

Foreldrabólkurin, ið stendur fyri tiltøkunum hjá piltunum sigur, at dreingirnir eru sera spentir, at sleppa til Danmarkar at spæla fótbólt, har koma teir at royna seg ímóti liðum úr Danmark, Noregi, Canada og Svøríki. Hetta er mennandi fyri dreingirnar og eitt upplivilsi fyri lívið.

Dýrabiðidag høvdu teir stuðulsrenning, og tað gav teimum 16.151 krónur. Teir runnu tilsamans 62,9 km í 20 min. Í miðal runnu teir 3.931 m.

Eisini hava teir selt skavað og vinn seðlar fyri Blindafelagið og lutaseðlar fyri Tórshavnar Ítróttarráð.

Eitt bingo hava teir havt og fara at hava eitt afturat 1. juli í Pálsstovu. Ruddingardagin fara teir at rudda fyri Tórshavnar kommunu.

Ein Danmarkarferð er kostnaðarmikil, men við góðum stuðli frá fyritøkum og einstaklingum letur tað seg gera.

Foreldur og piltar takka øllum sum hava stuðla liðnum.